## DAGSINS MEINING

# Mikines - ein blómandi mentan

Í gjár læt upp ein tann størsta framsýningin nakrantíð í Listaskálanum. Um ein góðan mánað eru 100 ár síðani okkara størsti málari, Samuel Joensen Mikines, varð borin í heim. Fyri at heiðra listarmannin og geva fólki høvi at síggja eitt úrval av verkum hansara er henda stóra framsýningin fingin í lag.

Mikines, sum listarmaðurin vanliga var kallaður, var millum teir fyrstu føroyingarnar, sum tók tað djarva og stóra stigið at fáa sær eina listarliga útbúgving. Og hetta var í eini tíð, tá list ikki var vanlig í Føroyum, og í eini tíð, tá eingin útbúgvingarstuðul var at fáa. Men vit kunnu í dag vera takksom fyri tað dirvið, Mikines hevði.

Tað skerst ikki burtur, at Mikines er klassikkarin í føroyskari list, og hann var tann føroyski listarmaðurin, sum fekk viðurkenning uttan fyri landoddarnar. Áhugin fyri list hansara er framvegis stórur. Framsýningar við verkum hansara verða nógv vitjaðar og tá listarverk eftir Mikines eru til sølu er stórur áhugi at keypa.

Mikines hevur tí havt stóran tydning í síni fyri at marknaðarføra føroyska list og Føroyar sum land, eins og aðrir listarmenn hava tað í dag. Tað er einki at ivast í, at hann hevur eisini verið við til at geva øðrum føroyskum listarfólkum íblástur, sum Ingávur av Reyni onkuntíð hevur sagt í samrøðum.

Hóast tað er ein fjórðingsøld síðani Mikines andaðist er hann framvegis livandi millum tey, sum hava áhuga fyri list. At hann hevur er eitt gott pláss á føstu framsýningini í Listarskálanum er ein sjálvfylgja, og tað er at fegnast um, at ein ætlan hevur tikið seg upp at byggja eitt listarsavn í Mykinesi við verkum eftir máleran, sum var føddur og vaks upp í hesi veðurbardu oynni.

Umframt at listin ríkar okkum, kemst ikki uttan um, at list - og mentanin sum heild - er ein góður umboðsmaður fyri land og ferðavinnu. Vit vita, at fólk leita langar leiðir fyri at skoða listarverk, og hóast okkara listarfólk ikki eru millum tey heimskendu, hava vit nógv góð og stór listarfólk, eins og áhugin fyri føroyskari list er stórur.

Nógv er broytt, síðani Mikines - tá hann eftir seinra heimsbardaga var fluttur aftur til Føroya - sigur seg sakna eitt listarligt umhvørvi. Tá hann flutti heimaftur eitt skifti í fimmtiárunum var tað broytt til tað betra. Men støðan tá kann ikki samanberast við støðuna í dag. Vit hava nógv listarfólk, sum mála burturav, fleiri atlier, og nærum hvørja viku lata nýggjar framsýningar upp.

Tað er tekin um, at vit hava eina blómandi mentan, sum vit sum einsaklingar og sum felagsskapur eiga at stuðla, tí listin er ein dýrgripur fyri landið og fær eisini nógv fólk uttan úr heimi at leita henda vegin.

Nú er at vóna, at framsýningin í Listarskálanum verður væl vitjað, og at tey ungu læra henda stóra listarmannin og verk hansara at kenna.

**Sosialurin**

## VIÐMERKINGAR

# »Baptist? Tað er ein erlig sak!«

ANNITA Á FRÍÐRIKSMØRK
Løgtingskvinna



**– Eg var rættiliga hørm um mína útlegging av málinum um siðsemisnevndina, hóast eg helt og framvegis haldi, at Bill hevði eina stóra politiska nøs uppiborna fyri sína handfaring av nevndarvalinum. Eg var so mikið hørm, at eg frá Løgtingsins røðarapalli havi biðið hesi fýra, sum vald vóru, um umbering fyri mína útlegging av málinum, sigur Annita á Fríðriksmørk í viðmerking til Dánial á Dul Jacobsen**

Dánial á Dul Jacobsen sigur soleiðis í lesarabrævið 11. januar.:

*»bert einaferð í lívinum havi eg kent meg hongdan alment út vegna "munin" og tað var av Annitu á Fríðriksmørk. Hetta var tá hon, saman við øðrum, østi seg inn á Bill Justinussen, tí hann hevði valt meg og onnur í vísindasiðsemisnevndina. Hetta hóvaði, vegna sama mun, ikki henni.«*

Tað er rætt, at eg gjørdist ill um valið hjá Bill Justinussen av vísindaligu siðsemisnevndini á sinni. Eitt val, sum eg helt var óvanliga provokerandi frá landsstýrismansins síðu. Hetta er nú farið, og flest øll hava óivað gloymt, hvat tað var, sum alt hetta snúði seg um.

Men eg má viðganga, at eg var ov skjót úti við avtrekkjaranum tá, við tí avleiðing, at skotið var í so nógv rættað móti fýra óskildigum skilafólkum, sum Bill hevði valt. Minnist meg rætt nevndi eg ongantíð nakran við navni, men tey vóru sjálvandi løtt at finna fram til í einum so lítlum landi sum okkara.

Eg var rættiliga hørm um mína útlegging av málinum, hóast eg helt og framvegis haldi, at Bill hevði eina stóra politiska nøs uppiborna fyri sína handfaring av nevndarvalinum. Eg var so mikið hørm, at eg frá Løgtingsins røðarapalli havi biðið hesi fýra, sum vald vóru, um umbering fyri mína útlegging av málinum. Hetta helt eg meg hava skyldu til, tí hesi fýra skilafólkini høvdu jú bara takkað ja fyri eitt álitisstarv, sum landsstýrismaðurin beyð teimum. Og tá ið eg gangi út frá, at Dánjal á Dul Jacobsen ikki veit av hesi umbering, vil eg bera hana fram aftur her.

**Er munur á Brøðrasamkomununi og Fólkakirkjuni í dag?**

Síðani greiðir Dánjal á Dul Jacobsen frá, hvussu hann upplivdi tað at vaksa upp sum partur av Brøðrasamkomuni, har hann í ávísan mun vart happaður fyri sítt tilknýti til samkomuna. Men hetta var nú ikki verri enn so, sigur hann, at hetta eisini menti hann. Eg hugsi, at flestu føroyingar kenna til líknandi dømi, har børn ikki vildu spæla við onnur børn eina løtu inn í millum. Og orsøkirnar kundu verða so nógvar. Vart tú ikki pappitist, so hoyrdu foreldrini kanska til ein politiskan flokk, sum ikki altíð var tónleikur hjá øðrum. Pápin kanska drakk ov illa, ella var tað tí, at tú vart tjúkk ella reyðhærd. Hjá børnum verður alt brúkt, tá ið tey finna tað fyri gott ta einu lítlu løtuna. Ta løtuna kunnu tey tykjast rættiliga hjartaleys, men tey eru sum oftast líka skjót aftur við eini kærleiksfullari innbjóðing til spæl. Og ein týpiskur endi fyri eina søgu sum hasa um Mariu, sum ikki vildi spæla við Dánjal tí hann var baptist, er, at hon fegin vildi spæla við Dánjal seinni.

Søgan um langommu Dánjal, sum ikki slapp at verða lærari, tí at hon fór yvir til Brøðrasamkomuna, er ein syrgilig søga. Og eg trúgvi, at tær eru fleiri av slagnum. Gangi út frá, at hetta hevur verið einaferð millum 1865, tá ið William Sloan kom til Føroyar, og 1920, eitt tíðarskeið, tá ið stórar broytingar fóru fram í Føroyum og árin uttanifrá vóru ógvuslig á nógvum økjum, og vórðu hesi við til at broyta uppfatan okkara av máli og mentan og ikki minst av Fólkakirkjuni, sum hevði verið einaumboðandi her heima til Sloan kom til Føroya við Brøðrasamkomuni. Og hesa tíðina var tvístøðan millum Fólkakirkjuna og Brøðrasamkomuna veruliga trekt upp til tað ógvusliga.

Dømi eru so hinvegin eisini um, har Brøðrasamkoman var rættiliga sterk, at tú ikki vart vælkomin á ávís arbeiðspláss, um tú ikki vart vendur um til Brøðrasamkomuna. Men alt hatta er tíbetur yvirstaðið í dag (onkur vil kanska siga: nærum yvirstaðið). Havi sjálv verið á legu í Zarepta sum barn og verið við okkara børnum á sunnudagsskúla hjá brøðrasamkomuni. Í báðum førum góðar royndir, hóast eg eri heimahoyrandi í Fólkakirkjuni, har eg altíð komið at føla meg heima, tí tað er haðani, eg havi mínar røtur og barlast.

Skal ein samanbera syrgiligu lagnuna hjá langommuni hjá Dániali við nakað sum er aktuelt í løtuni, so er tað støðan hjá teimum samkyndu, har ið framstandandi embætisfólk, føra alment fram, at samkynd ikki áttu sloppið at undirvíst í fólkaskúlanum ella arbeitt í barnagørðum. Og so sigur sami maður enntá, at ein av landsstýrismonnunum hevur ringt til sín og givið honum sín fulla stuðul fyri tað, sum hann skrivaði í hasi greinini. Men hóast hesa søguna og støðuna í dag, so vil eg kortini halda uppá, at tollyndi millum samkomurnar er vaksandi.

Eitt annað dømi um størri tollyndi millum samkomur er, at tað uttan stórvegis mótstøðu verður góðtikið av Fólkakirkjuni, at landsstýrismaðurin í kirkjumálum er heimahoyrandi í Brøðrasamkomuni. Tað er eitt gott dømi um tollyndi, sum er í dag, og sum ikki hevði komið upp á tal fyri bara eini 50 árum síðani.

Tann frástøðan, sum mangan var øgilig millum serliga Fólkakirkjuna og Brøðrasamkomuna, er við at renna saman aftur. Vit eru ikki bangin fyri hvørjum øðrum longur, nakað sum eg annars haldi merkti tíðina eftir, at eindarmentanina var konfronterað við onnur viðurskifti – sum tíbetur komu til landið. Nú er holdningur meira millum fólk, sum MC sigur í sanginum, at vit eru so »ymisk, men tó«.

At vit hoyra til hvør sína samkomu er meira tí at foreldur og forfedrar okkara gjørdu tað, heldur enn tí, at vit ikki kunnu góðtaka nakað annað, enn tað vit sjálvi eru partur av.

So, tá ið Dánjal á Dul Jacobsen endurtekur spurningin, sum hann setti mammu síni sum barn, og spyr í yvirskrivtini til lesarabrævið »Mamma, baptist hvat er tað?« so trúgvi eg, at í dag vildi svarið bara verið at:

»Baptist? Tað er ein erlig sak!«

W W W . S O S I A L U R I N . F O


Sosialurin

**Sosialurin**
Stovnaður: 1927
**Ábyrgdarblaðstjóri:** Jan Müller jan@sosialurin.fo
**Blaðstjóri:** Eirikur Lindenskov eirikur@sosialurin.fo
**Redaktiónssekreterur:** Inna Törnroos inna@sosialurin.fo
**Fíggjarleiðari:** Tóki Højgaard toki@sosialurin.fo

**Marknaðardeild:** lysing@sosialurin.fo
Jonhard Hammer jonhard@sosialurin.fo
Durita Simonsen durita@sosialurin.fo
Finnbjørg Nattestad finnbjorg@sosialurin.fo
Gudny Langgaard gudny@sosialurin.fo

**Blaðfólk:**
Áki Bertholdsen aki@sosialurin.fo
Vilmund Jacobsen vilmund@sosialurin.fo
Snorri Brend snorri@sosialurin.fo
Magnus Gunnarsson maggi@sosialurin.fo
Terji Nielsen terji@sosialurin.fo
Anna V. Ellingsgaard anna@sosialurin.fo
Eydna Skaale eydna@sosialurin.fo
**Ítróttur:**
Jákup Mørk jakup@sosialurin.fo
Terji Nielsen terji@sosialurin.fo
**Myndamenn:**
Álvur Haraldsen alvur@sosialurin.fo
Jens Kristian Vang jensk@sosialurin.fo

**Sosialurin í Norðoyggjum:**
Postsmoga 231
Nólsoyar Pálsgøta 1, 700 Klaksvík
tel. 458686 fax 458687
e-post: klaksvik@sosialurin.fo
**Sosialurin í Suðuroy:**
tel. 375364 fax 375464
tel. 228814
e-post: aki@sosialurin.fo
e-post: dagfinn@sosialurin.fo

**!!! Haldarar**
sum ikki hava fingið blaðið, kunnu ringja til 341818 og boða frá, leygardag tó frá kl. 11.00-13.00

**Uppseting/prent:**
Uppseting: Føroyaprent
Prent: Prentmiðstøðin
**Útgevari:**
Sp/f Sosialurin
**Avgreiðsla:**
Mán.-frí. 8-16
Tórsgøta 1, 100 Tórshavn
Tel. 341800, Fax 341801
**Postadressa:**
Postboks 76, 110 Tórshavn
**E-mail:**
post@sosialurin.fo
lysing@sosialurin.fo
lysingartorg@sosialurin.fo
varp@sosialurin.fo

Blaðið verður prentað mánadag-fríggjadag klokkan 14[00]

**Lýsingar**

| **Freistir:** | Tekstlýsingar | Størri lýsingar | Lýsingartorgið | Heilsanir |
|---|---|---|---|---|
| Mánadagsblaðið | Mán.kl. 10 | Frí. kl. 15 | Frí. kl. 12 | Frí. kl. 12 |
| Týsdagsblaðið | Týs. kl. 10 | Mán. kl. 15 | Mán. kl. 12 | Mán. kl. 12 |
| Mikudagsblaðið | Mik. kl. 10 | Týs. kl. 15 | Týs. kl. 12 | Týs. kl. 12 |
| Hósdagsblaðið | Hós. kl. 10 | Mik. kl. 15 | Mik. kl. 12 | Mik. kl. 12 |
| Fríggjadagsblaðið | Frí. kl. 10 | Hós. kl. 15 | Hós. kl. 12 | Hós. kl. 12 |

Størri lýsingar, sum nógv arbeiði stendst av, mugu vera inni í góðari tíð og áðrenn ásettu freistir.
Framíhjápláss má umbiðjast í góðari tíð.

**Stødd:**
Ein heil síða í Sosialinum er 254 mm breið og 346 mm í hædd. Breiddin á einum teigi er 39mm og rúmið millum teigarnar er 4mm.

**Innsent tilfar**
Fult navn skal vera undir innsendum tilfari. Innsendar greinar, har blaðleiðslan ikki er kunnað um bústað og telefonnummar, verða ikki settar í blaðið.